# Gerningsmaðurin umborð á Tórsvík tikin

**Maðurin, sum stakk føroyska skiparan umborð á Tórsvík, er nú tikin. Talan er um ein mann frá Filippinunum, sum silgdi við Tórsvík. Maðurin varð tikin ,so skjótt, sum Tórsvík legði at Norskari kei**

Tikni maðurin, sum er frá Filippinunum, hevur síðani mikunáttina sitið í varðhaldi hjá norsku løgregluni. Hann skal væntandi geva frágreiðing einaferð mikudagin.

Norska løgreglan arbeiðir í skrivandi løtu við at finna útav hvat fyri mál, hann tosar, og síðani skal ein tolkur finnast, veit norska blaðið VG at siga.

Tí veit løgreglan framvegis ikki nakað um smálutirnar, í sambandi við hendingina, tá føroyski skiparin varð stungin, men kanningin verður allrahelst hildin einaferð mikudagin.

Tá føroyski skiparin við tyrlu varð fluttur á sjúkrahús, tók ein annar skipari yvir umborð á Tórsvík, og førdi skipið inn til lands.

Gerningsmaðurin var alla tíðina umborð á Tórsvík, inntil løgreglan mikunáttina tók hann, tá Tórsvík legði at kei í Kristanssund.

Tá skipið kom til lands fór eisini ein sálarfrøðingur umborð á Tórsvík, og gav restini av manningini kreppuhjálp.



*Tórsvík eru nú komin inn til Kristiansund, og løgreglan hevur tikið filippinska gerningsmannin í varðhald. Føroyski skiparin varð lagdur undir skurð týsdagin, og hann hevur tað nú betri, hóast støðan enn er álvarslig*

### Serlig viðurskifti

VG skrivar eisini á heimasíðni, at norska løgreglan hevur havt samband við myndugleikarnar í Føroyum ígjøgnum Interpol. Norska løgreglan bíðar nú eftir einum føroyskum kravi um at fáa mannin útflýggjaðan ella einum fyrispurningi um at fáa aðra hjálp í sambandi við kanningararbeiðið.

Hetta er eitt rættiliga serligt mál, skilst, tí hendingin fór fram í altjóða sjógvi.

Norska løgreglan fer at hava gerningmannin fongslaðan, inntil endaligu snøklarnir eru fingnir upp á pláss.

### Undir skurð

Álopni føroyski skiparin varð stungin djúpt í bringuna og magan.

Støðan er framvegis álvarsom, men í tíðindaskrivi frætta vit, at hon hóast alt er batnað. Skiparin varð lagdur undir skurð seinnapartin týsdagin, og hann hevur tað nú betri. Hann verður tó liggjandi á sjúkrahúsinum í Trondheimeina tíð afturat, og bæði familjan og fólk frá Thor eru flogin til Norra, fyri at vera um hann.

Tórsvík, fylgdi við einum skipi, sumskjeyt seismikk uttanfyri norsku strondina, tá ein av manningini brádliga leyp á føroyska skiparan við knívi, og stakk hann sera illa í bringuna og magan.

Skiparin varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús í Tróndheim.

# Føroyskt-svenskt felag stovnað

**Leygardagin 11. juni var fundur í dansistovuni í Norðurlandahúsinum. Eini tjúgu fólk hittust, og stovnaðu føroysktsvenskt felag**

*eydna@sosialurin.fo*



Felagið er ætlað øllum, sum hava áhuga í føroyskum/svenskum samskifti, ella hava okkurt tilknýti til Svøríki.

Tað, sum fór fram leygardagin 11. Juni, var, at lógin fyri felagið var gjøgnumgingin og nevnd varð eisini vald. Í nevndina komu tey trý, sum hava gjørt fyrireikingar til felagið, nevniliga Ann- Kristin Nilsson, Torbjörn Nyström og Katarina Petersen.

### Hittast 2. juli

Nógv hugskot komu eisini fram á fundinum, um hvussu felagið kann skipa sítt virksemi.

Avgerð varð millum annað tikin um at hittast óformelt fyrsta leygardag í hvørjum mánaði til eitt prát.

Fyrstu ferð limirnir hittast á henda hátt er 2. juli kl. 16 í Norðurlandahúsinum.

Fyrsta veruliga tiltakið hjá felagnum verður seinast í august mánaði. August er nevniliga ein mánaður, tá sviar serliga plaga at savnast um tveir serstakar tjóaðrrættir.

Annar er feskvatnshummari, sum hevur ligið í serligum dildlaka. Danir nevna slagið krebs og sviar kráftor. Í Svøríki plagar veitslan at vera nevnd kräftskiva, og kann vera stak hugnalig.

Hin rætturin, sum serliga verður etin longri norðuri í Svøríki, er surstrøming. Tað er lítil sild úr Eystursjónum, sum er niðursjóvað í dós. Talan er um sterkan kost, sum ikki er fyri allar nasar og gómar.

Øll kunnu vera limir í felagnum, bara tey hava áhuga. Tey, ið veilja verða limir, kunnu venda sær til ein av nevndarlimunum ella senda teldupost til sff@abelit.fo.

# Løgreglan veit framvegis einki

**– Vit hava samband við norsku løgregluna, men tað eru enn nøkur ting, sum ikki eru komin heilt upp á pláss enn, og sum vit nú bíða eftir, sigur Bergleif Brimvík**

Norska løgreglan er farin undir kanningararbeiðið av tilburðinum, tá ein maður frá Filippinunum stakk føroyska skiparan umborð á Tórsvík.

Løgreglan í Havn hevur framvegis ongar upplýsingar, tí tað eru nøkur viðurskiftið, sum skulu koma upp á pláss fyrst.

– Vit hava samband við norksu løgregluna, men higartil gera teir tað, sum skal gerast, m.a. við at kanna hvat tað var, sum hendi umborð, greiðir Bergleif Brimvík frá.

### Veldst um

Hann sigur, at tað ikki eru nakrar greðar mannagongdir sum so, tí tað veldst um so ógvuliga nógv ting.

– Tað eru ymisk ting sum gera seg galdandi, m.a. hvar skipið var statt, tá álopið hendi. Var skipið í altjóða farvatni er mannagongdin ein onnur, enn um skipið t.d. var í føroyskum ella norskum sjógvi, greiðir Bergleif Brimvík frá.

Spurdur, um hvussu leingi teir fara at vera í bíðistøðu, svarar Berleif, at hann væntar at fáa greiði á málinum seinni mikudagin ella einaferð út á hósdagin.

– Tá verður so avgerð tikin um, hvørt vit yvirtaka málið, um gerningsmaðurin skal til Føroyar til rættarsakina o.s.fr. Men enn kann eg ikki svara nøkrum av spurningunum, tí eg veit sum sagt ikki hvussu tað verður, sigur Bergleif Brimvík at enda.